# Tá frægir hittast

*Lag: stígum fast á várt gólv*

1.Vetrarkvøld á flatlondum
Kuldin býtur í skinnið
Garpar savnast gleðiliga
í Føroyahúsi inni

*Niðurlag:*
*Stígum fast á várt gólv,*
*sparum ei vár skóm,*
*Guð man ráa hvar vit drekka onnur jól.*

2.Her er komin ein stiril saman
øll hvønn annan kenna
Turpin og Gutti við góðari vóning
uppi á gólvi renna

3.Ásmund settist við borðið niður
høgt í gleði settur
eg fari ei frá borðinum
fyrrenn eg eri mettur

4.Arni setist í sterkan stól
Tekur so til orða
Eg skal eta meg yvir rygg
og mær skal eingin forða.

5.geitirnar tvær og oksarnir fimm
og fjøruti grindalikkjur
Alt tað skal eg eta upp
Aðrenn eg biði um drykkin

6.Dánial svarar so hánisliga
heldur á volgarsbita
Tað svørji eg við sannan gud
So skalt tú leingi sita

7.Jóhan hann etur dúliga
hevur tó tíð at mæla
vit skulu halda dansisið
ei ilt um onnur tala

8.Eg havi lisið manga bók
tær um kvæðir røða
Vit skulu fara upp á gólv
øll ørindini at kvøða

9.Torgun situr við borðenda
ristur fyri sær kross
sleppur hann nú á gólvið upp
so verið Guð við oss.

10.Jónleif mælir blídliga
hann etur sum ein gammur
hoyri meg allir garpar snjallir
var her eingin drammur.

11.Maður leypir frá borði upp
skeinkir runt í Sali
tað verður tikið rívan til
men onkur heldur talið.

12.Minsti maður, ið inni var
hann drakk gløsini tvey
hini drukku fýra og fimm
onnur seks og sjey.

13.Hetta er gott grundarlag
veitsluróm at vísa
haldi á so manniliga
til sólin fer at rísa

*Jólaát 2002*
**Dansifelagið Fótatraðk**

This document was created with Win2PDF available at http://www.win2pdf.com.
The unregistered version of Win2PDF is for evaluation or non-commercial use only.
This page will not be added after purchasing Win2PDF.